# Til Skotlands við familjuni

**Navn:** Eli Hentze
**Bústaður:** Sandur
**Aldur:** 37
**Starv:** Lærari í skúlanum á Sandi
**Frítíðarítriv:** Eg geri nógv við ítrótt, og annars dámar mær sera væl at lesa.

*Nær fært tú summarfrí í ár?*
Eg fái Summarfrí, tá síðsti formuladysturin er spældur undan steðginum. Eg skal tó til Aberdeen við U-15 landsliðnum mitt í juli, so summarfrítíðin byrjar ikki rættiliga fyrrenn eg komi heim aftur haðani.

*Hvussu fert tú at halda summarfrítíðina?*
Eg ætli mær ein túr til Skottlands við familjuni í eini 10 dagar.

*Hví hevur tú valt at fara til júst Skotland?*
Vit hava trý børn, og vit vilja ikki hava tað alt ov heitt, tá vit fara at ferðast. Staðið í Skotlandi tykist vera ógvuliga barnavinarligt, samstundis sum Norðurskottland hevur eina sera vakra náttúru, so hetta passaði okkum útmerkað væl. Vit hava eisini verið í Skotlandi fyrr, og vit dámdu væl at vera har.

*Plagar tú at ferðast uttanlands um summarið?*
Ja, vit plaga at vera uttanlands javnan. Vit leggja ofta summarfrítíðina eftir børnunum, og Danmark er eitt fram úr barnavinarligt land at ferðast í. Harafturat hava vit familju í Danmark, sum vit plaga at vitja.

*Plagar tú at ferðast í Føroyum um summarið?*
Vit hava ikki ferðast nógv í Føroyum sum familju, men í mínum starvi sum lærari havi eg ferðast nógv kring landið.
*Ferðast tú hinar árstíðirnar?*

Eg eri onkuntíð uttanlands í arbeiðsørindum við sjónvarpinum, men tá eg skal ferðast við familjuni, er tað oftast um summarið.

*Hvat er títt dreymaferðamál?*
Eg vildi fegin sloppið til Ísrael ella Brasilia. Harafturat kundi eg gott hugsa mær at sloppið ein túr til Namibia.




*Eli Hentze er javnan uttanlands við familjuna, og í ár fara hann og familjan ein túr til Skottlands í einar 10 dagar*




















